Egil Olsen fiskivinnufrøðingur (Master of Fishery Science)

# Biotøkni – møguleikar og avbjóðingar í Føroyum



*Egil Olsen, fiskivinnufrøðingur*

**1. partur**

Í løgmansrøðuni fyri 2001, verður biotøkni nevnd, sum ein vinnugrein ið landsstýrið heldur at stórur dentur eigur at verða lagdur á framyvir

Vinnuframagrunnurin, sum løgtingið samtykti at seta á stovn í vár, nevnir eisini biotøkni, sum ein av teimum vinnugreinum, sum landstýrið metir rætt at stuðla.

Í samband við at Framtaksgrunnurin bleiv føroyskur burturav, segði nevndin í tíðindaskrivi, at grunnurin vónaði at verða við til at menna nýggjar vinnumøguleikar, serliga vinnur ið kravdi stóra vitan.

Av tí at undirritaði tað seinasta árið, hevur arbeitt nakað við biotøkni í fiskivinnuni, hava vinnulívsfólk og onnur heitt á undirritaða, um at skriva eina grein um hetta evni.

Í hesi greinini fari eg at leggja dent á at lýsa hetta evni við atliti til havbiotøkni t.m. fiski og alivinnuna, og at knýta hetta at møguleikunum og avbjóðingunum fyri hesar vinnur í Føroyum, soleiðis sum eg meti støðuna.

Greinin er uppbygd soleiðis:

Fyrst verður hugtakið biotøkni lýst. Síðan verður komið inn á havbiotøkni og sambandið millum fiskivinnu, havbúnað og biotøkni.

So verða nevnd dømi um aktuell arbeiðsøki innan havbiotøkni.Her verður hugt eftir hjáframleiðslum úr fiski og alivinnuni, "bioprospektering" og sambandinum ímillum biotøkni og alivinnu. Rávøru,- framleiðslumøguleikar og marknaðir verða lýstir, eisini við myndum.

Síðan verður roynt at lýsa krøvini og fortreytirnar fyri eini havbiotøkniskari vinnu.

At enda gevi eg mítt boð uppá, hvussu vit kunnu koma í gongd í Føroyum við havbiotøkni.

## HVAT ER BIOTØKNI:

Biotøkni kann stutt allýsast sum:

*"Tøkni til at nýta lívverur, kyknur, partar av kyknum og/ella mýlum til vørur og tænastur"*

Ymiskar greinir eru av biotøkni, alt eftir uppruna ella, hvat umhvørvi talan er um, t.d. havbiotøkni, landbúnaðar biotøkni, skógarbiotøkni, biotøkni innan annan matvøruídnað o.s.fr.

Norðmenn seta sera stórar vónir til havbiotøkni.

Meðan virðiskapanin innan biotøknina í dag er mett til umleið 2 milliardir NOK kr, verður roknað við at í ár 2020, verður virðisskapanin av havbiotøkni fra fiski og alivinnuni umleið 20 milliardir NOK kr.

Mett verður eisini at tann prosentvísi vøksturin innan biotøknina, verður munandi størri enn vøksturin annars innan fiski og alivinnuna.

## HAVBIOTØKNI

Mynd 1. lýsir samanhangin ímillum vanliga fiskivinnu, havbúnað og biotøkni.

*MYND 1: Sambandið - vanlig fiskivinna, havbúnaður og biotøkni*

Fiskivinna og havbúnaður eru rávøruútvegarar til biotøkniska ídnaðin m.a. gjøgnum ymiskar hjáframleiðslur. Hinvegin útvegar biotøkniski ídnaðurin evnir, mannagongdir, og tilgongdir, sum verða brúkt til at bøta um verandi framleiðslur og til at menna fiski- og alivinnuna á ymiskum økjum innan hesar vinnur (ensymir, vaksinur, fóður v.m.).

Tann biotøkniski ídnaðurin framleiðir eisini evni, tilgongdir til annan ídnað og marknað (sí seinni).

Endamálið, er millum annað, at framleiða mat á ein so burðardyggan hátt sum gjørligt. Biotøknin er tí í tráð við rákið hjá brúkarunum runt um í heimi og eisini gott um at halda í altjóða samráðingum.

Málið er sjálvsagt eisini at bøta um kappingarførið, og at lønsemi skal verða so gott, at tað støðugt er møguligt at menna vørur, sum eru og at skapa nýggjar vørur og tænastur innan hesar vinnur.




**MYND 1: Sambandið - vanlig fiskivinna, havbúnaður og biotøkni**

## HAVBIOTØKNI - AKTUELL ABEIÐSØKI

Innan havbiotøkni kunnu nevnast trý øki sum serliga hava áhuga í løtuni:

- Hjáframleiðslur
- Bioprospektering
- Havbúnaður og biotøkni

Niðanfyri verður stutt greitt frá møguleikum og marknaðinum innan hesi trý økini.




**MYND 2: Dømi um hjáframleiðsluúrdráttir úr toski (Olsen 1999)**

## Hjáframleiðslur úr fiski og alivinnuni - møguleikar og marknaðir

Tann føroyska fiski- og alivinnan framleiðir árliga fleiri túsund tons av sokallaðum "hjáframleiðslum".

Tá ið hugtakið ”hjáframleiðsla” verður brúkt, er tað við støði í, at fiski- og alivinnan hava eina "høvuðsvøru" og at restin av tí lívfrøðiliga tilfeinginum í stóran mun verður roknað sum fiskarusk ella slógv.

Í fiskídnaðinum t.d. verður orðið hjáframleiðsla ofta bundið saman, við tí sum eftir er av fiskinum, táið hesin er framleiddur til flak.

Hjáframleiðslurnar umfata vanliga, høvdið á fiskinum, beinagrindina, skræðuna, umframt rogn, livur, sil, magar og garnar.

Í nógvum av av hjáframleiðslunum eru stórar nøgdir av serligum evnum, sum gera tær serliga vælegnaðar, sum rávøra til serúrdráttir.

Úrdráttirnir úr hjáframleiðsluni verða tískil brúktir til nógv ymisk endamál, eitt nú bæði í matvøruídnaðinum, heilsikostídnaðinum og heilivágsídnaðinum.

Í Mynd 2 og 3, er víst dømi um hjáframleiðsluúrdráttir og marknaðirnir fyri hesum.

Verður roknað við at tað í miðal verða fiskað 100.000 tons av botnfiski undir Føroyum, kann teoretiskt roknast við umleið 15.000 tons av innvølum. Sum støðan er, koma meiri enn 90 % av innvølunum ikki til høldar men verða tveittir fyri borð.

Verða 70.000 tons av fiskinum flakaskornir á landi, kann teoretiskt roknast við ímillum 20 og 25.000 tons av hjáframleiðslum, sum koma frá flakaframleiðsluni.

## Meginparturin verður gjørt til slógv og minkafóður

Roknað verður við at í ár, verður framleiðslan av aldum laksi í Føroyum um 50.000 tons.Frá hesi framleiðslu kann roknast við eini hjáframleiðslu uppá umleið 15.000 tons. Hetta vedst tó alt um, hvussu nógv av laksinum verður virka og, hvussu nógv verður selt heilt. Roknast kann við at størri partur av laksinum í framtíðini vil verða viðgjørdur á landi, og tískil fer nøgdin av hjáframleiðslum økjast.

Rávørumøguleikarnir frá feskfiskavinnuni og alivinnuni í Føroyum er tískil omanfyri 50.000 tons.

MYND 3: Frá havi til marknað - úrdráttir og marknaðir fyri hjáframleiðslur úr botn- og uppisjóvarfiski, alifiski og rækjum (Rubin 2001).







**MYND 3: Frá havi til marknað- úrdráttir og marknaðir fyri hjáframleiðslur úr botn- og uppisjóvarfiski, alifiski og rækjum (Rubin 2001).**